# Pál móti heimsins bestu

**SVIMJING** Sunnudagin skal Pál Joensen royna seg á stuttgeil í Dubai. Vónirnar um heiðursmerki eru góðar

Uni Holm Johannesen

Pál er styrkismettur sum nummar fimm til 1500 frí, sum verður sunnudagin.

Hann hevur svomið skjótari og áður vunnið á flestu hinum luttakarunum.

Pál Joensen hevur svomið 400 metra frí í dag, og Portalurin hevur fylgt við gongdini.

**Teir, sum kappast í 1500 metra frí sunnudagin:**

| | |
|---|---|
| Oussama Mellouli (TUN) | 14:24.71 |
| Federico Colbertaldo (ITA) | 14:25.68 |
| Mads Glæsner (DAN) | 14:26.74 |
| Sébastien Rouault (FRA) | 14:30.58 |
| Pál Joensen (FØR) | 14:38.00 |
| Samuel Pizzetti (ITA) | 14:41.29 |
| Sergiy Frolov (UKR) | 14:42.01 |
| Gergely Gyurta (UNG) | 14:46.39 |

*uni@sosialurin.fo*

# Jan Mølvad skal venja FC Hoyvík

**FÓTBÓLTUR** Jan Mølvad Laursen verður venjari hjá FC Hoyvík í 2011

Uni Holm Johannesen

Hann hevur verið knýttur at felagnum í fleiri ár. Hann stóð á odda fyri næstbesta liðnum, sum vann seg upp í triðbestu deildina í 2009. Sum uppflytarar endaði liðið nummar trý í deildini í ár.

Rúni Nolsøe varð venjari hjá FC Hoyvík við kappingarbyrjan í fjør. Hann takkaði fyri seg í summar, og John Eystberg tók við venjarastarvinum.

FC Hoyvík var nummar sjey í røðini í næstbesta deildini í ár.

*uni@sosialurin.fo*

# Ítrótturin um vikuskiftið:

**Fríggjadagin, 19. desember:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | StÍF – VB | Skála | Klokkan 20.00 | Kvinnur |

**Leygardagin, 18. desember:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | Kyndil – Neistin | Tórshavn | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Tjaldur – Stjørnan | Runavík | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | StÍF – KÍF | Skála | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – Neistin | Tórshavn | Klokkan 16.00 | Menn |



*Bláa og grøna slagið um Havnina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Grannarnir bresta saman

**HONDBÓLTURIN** Neistin hevur mist eitt stig higartil. Tað var í fyrsta slagnum um høvuðsstaðnum í hesum kappingarárinum. Nú spæla Neistin og Kyndil aftur

Uni Holm Johannesen

Tað var líkt til, at Kyndil skuldi knógva Neistanum.

Grønlittu havnarmenninir vóru framman fyri við tveimum málum, tá fýra minuttir restaðu í.

Neistin vann seg upp á javnleik, og hóast Kyndil áttu seinastu royndina í dystinum, so vóru stigini býtt í tvey.

Nú hevur Kyndil aftur møguleikan at vinna á grannunum, sum hava verið fullkomiliga einaráðandi í hesum kappingarárinum.

## KÍF skal reisa seg

Kollfirðingar, sum hava støðið seg væl í stríðnum um finalupláss, hava ikki vunnið seinastu tvær ferðirnar.

KÍF tapti fyrst fyri Neistanum á útivølli, og síðan fyri VÍF á heimavølli.

Nú vitja kollfirðingar á Skála, har StÍF bíðar.

StÍF hevur bara vunnið á VÍF á heimavølli, og so tvær reisur á Team Klaksvík í hesum kappingarárinum.

So líkindini fyri, at KÍF kemur aftur á beint eru góð.

## Grannauppgerð hjá kvinnum

Tríggir dystir eru á skránni í bestu kvinnudeildini.

StÍF og VB spæla í kvøld.

Kyndil og Neistin spæla grannauppgerð í morgin. Neistin kann vinna tvey týdningarmikil stig í morgin, tí Tjaldur og Stjørnan, sum eru á ovastu plássunum, spæla í Runavík. Annað hvørt fer Neistin frá Tjaldri, ella vinnur liðið seg nærri Stjørnuni.

Stórdysturin verður í Runavík. Tjaldri, sum hevur vunnið fýra ferðir upp í slag, hevur fulla úrtøku við Trygva Mortensen sum venjara.

Nú sleppur hann av álvara at standa sína roynd, tá verandi greipuvinnararnir vitja.

*uni@sosialurin.fo*

# Dysturin varð útsettur

Landskappingardysturin millum Team Klaksvík og H71 skuldi ætlandi spælast í Badmintonhøllini í Klaksvík í gjár.

Hondbóltssambandið segði ikki frá, men heimasíðan hjá hoyvíkingum skrivaði seinnapartin, at dysturin var útsettur vegna veður.

Tað er framvegis ikki greitt, nær dysturin verður spældur.

*uni@sosialurin.fo*